## HEILSANIR



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 12.07.03, veita vit okkara hjartans tøkk.
**Jonna & Kári**



Vit takka øllum tykkum sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 16. apríl 2003.
**Barbara og Niels Uni**



**Góðu tit bæði**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum og ringforlovilsinum. Vit ynskja tykkum nógvar góðar løtur og nógv góð ár í framtíðini. Vit elska tykkum soooo øgiliga nógv.
**Heilsan Judit, Rókur, Rip, Rap og Rup**



**Góði Niels Pauli**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í dag. Her eru tit knáir navnarnir báðir
**Heilsan Rani**



**Samband ynskist**
Núklaktur piparsveinur ynskir samband við eina og hvørja kvinnu. Børn, aldur og IQ hevur einki at siga.
**Heilsan Hillan**



**Góði Hilbert Kári Joesen**
Hjartaliga tillukku við piparinum.
**Heilsan vit**



**Góði fitti Agnar**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum 21. okt.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Elinborg**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 28. okt.
**Ynskja Klara og Hjalmar**



**Góða elskaða Karin**
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum í dag. Jesus signi teg.
**Ynskja omma og abbi á Argjum**



**Góða Birita**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 30. okt.
**Ynskja omma og abbi á Landavegnum**



**Góða Elinborg**
Hjartaliga tillukku við 30 ára føðingardegnum 28. okt.
**Ynskja mamma, babba og Jóngerð**



**Góða fitta Elinborg**
Hjartaliga tillukku við 30 ára føðingardegnum 28. okt.
**Ynskir Agnar**



**Góða Bettomman**
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum 30. okt. Guds ríku signing í framtíðini.
Bestu ynskir frá okkum
**Judit og Rókur**



**Hey tit báðir**
Tillukku við degnum í dag. Her eru tit bara fittir og blivnir eitt sindur eldri og bestu kundar hjá onkrum við Kirkjar.
**Heilsan Petur Jakku og Kem**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




**Mercedes 300 E Diesel**

frá '95, í sera góðum standi, til sølu.

Tlf. **442057** ella **220257**
best eftir kl. 17.00





**Haldarar hjá Sosialinum**

ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

**Prentmiðstøðin**



veitst tú ikki tað?
Sosialurin


## Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruplåss leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið HJÁ GUNLEIVI**
**Tlf. 228838 ella 312161**


Sosialurin -tað loysir seg


## Søkt verður eftir fólki

Søkt verður eftir fólki við starvsroyndum at arbeiða í blómuhandli.

Umsókn verður at senda innan 4. november

Árstíðirnar
J.C.Svabosgøta 10 · 100 Tórshavn · tel 317400


COMPAQ Local Service Partner
hp invent
Teknisk ráðgeving
Netinstallatiónir
Tráðleysar netskipanir
Autoriserað verkstað
Tænastusáttmálar
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840




# Yvirlýsing um fosturtøku

**Í sambandi við orðaskiftið um fosturtøkuspurningin hevur Kvinnufelagið á limafundi 20. oktobur 2003 gjørt hesa niðurstøðu:**

Eins og um hetta mundið í fjør gera vit vart við, at

- Kvinnufelagið av fullum huga tekur undir við ST-samtyktunum um rættindini hjá kvinnum at ráða yvir sínum egna kroppi í øllum viðurskiftum; eisini teimum sum snúgva seg um heilsu, nøring, kynslív og familjumynstur. Hesar samtyktir vórðu gjørdar á 4. Altjóða Kvinnuráðstevnu ST´s í Beijing í 1995.

- Kvinnufelagið styðjar ein komandi lógartryggjaðan rætt hjá føroyskum kvinnum til sjálvvalda fosturtøku og mótmælir staðiliga royndunum hjá landsstýrismanninum í familju- og heilsumálum at skerja tað sindrið av rættindum, kvinnur hava á hesum øki. Vit ynskja, at eisini henda lóggáva verður broytt, so hon samsvarar við hinar norðurlendsku.

- Kvinnufelagið átalar, at kommunulæknar sum liður í hesum átaki landsstýrismansins verða lagdir undir at bróta landsins lógir.

- Kvinnur kenna sína etisku ábyrgd eins væl og menn og samfelagið sum heild; ikki minst tá ið tað snýr seg um børn. Eingin velur fosturtøku til stuttleika. Upplýsing og onnur fyribyrgjandi og bøtandi tiltøk eru einasta gongda leið í hesum álvarsama máli.

- Pengarnir á fíggjarlógini til Pro Vita vóru betur farnir til hetta endamál. Tað er svárt at vita sær, at landið styðjar ein felagsskap, sum leggur stein oman á byrðu hjá kvinnum, ið óynskt eru við barn; ein felagsskap sum tykist vera partur av alheims átakinum ímóti rættindunum hjá kvinnum at ráða yvir sínum egna kroppi.

**Kvinnufelagið í Havn**
Kvinnufelagið í Havn, Postsmoga 1111, FO-110 Tórshavn